skemt

# Fert tú til Føroyar?



**Sarkozy:** Passar tað, at tú skalt til Føroyar?
**Gore:** Ja, eg fari at vitja Magna og Jóhan Páll
**Sarkozy:** Hvussu eru teir?
**Gore:** Bill segði, at teir eru akkurát sum vanlig fólk, púra niðri á jørðini, so eg gleði meg at heilsa upp á teir
**Sarkozy:** Kanst tú ikki leggja eitt gott orð inn fyri meg, so eg kanska eisini slapp at hitta teir.
**Gore:** Jú ,tað skal eg gera. Men teir hava nógv at gera, so tað er ikki vist, at teir hava tíð til tín.

Mynd: Polfoto

# Hey tit, skeivan veg

Hesi flogførini hava beina kós ímóti jørðini, men alt tykist tó verða undir kontroll. Tað eru flogfør hjá herinum í Singapore, sum vísa seg fram við øllum hugsandi kynstri á einum tiltaki í farnu viku. F16 flogførini venda upp og niður, og áskoðararnir kunnu ikki verða annað enn hugtiknir.

Mynd: Polfoto



## Leyst og fast um stórt og smátt

**FSF-forsetavalið = HOLMgonga ella STÓRUstovugongd? UNDRI meg á FRAMferðarháttin hjá NÍF**

**TAKS burdi heldur itið SAKS: „Skulu Aftur Krevja Skatt"**

**Ferðsluløgreglan skal eita LAKS: „Latið Akførini Koyra Spakuliga"**

**Javnstøðunevndin skal eita MAKS: „Munnu Allar Kvinnur Samtykkja?"**

**Brennistøðin á Hjalla skal skifta navn til BAKS: „Brenning Av Kommunalum Skrelli"**

**Sjónvarpið skal eita FAKS „Fáa Allar KringvarpsSendingar" (frá DR)**

# *Í rangastrúpan*

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Restorff's farið í søguna?**
Víkingur skipar fyri SISU Cup
Olivant

**Keðiligt í Klaksvík**
Eingin fær nakað í Klaksvík
Sosialurin

**Nýggj ítróttargrein**
Í dag varð fyri fyrstu ferð skipað fyri vetrarkappingini 2007/2008 í Hvannasundi
Sosialurin

**Teitur var 19 í tvey ár**
Og um byrjanina til karrieruna í Keypmannahavn, har hann 19 ára gamal sat í tvey ár og skrivaði sangir, áðrenn hann varð uppdagaður og sendur til USA at gera tónleik
Norðlýsið

**Sjálvandi ikki**
Sjómenn skulu ikki landa livrina
Portalurin

**Tað, sum skuldi til**
Gularót skal fáa suðuroyingar at leggja kommunurnar saman
Sosialurin

**Hon krógvaði seg leingi**
Heimsins elsta kvinna, sum nýliga er funnin...
Dimma.fo

# Føroyskur bygdamóti



Nú blanda føroyingar seg eisini upp í mótaheimin. Vit skapa okkara egna móta – gjarna eitt sindur ullintan – og hetta kundi verið eitt gott dømi um, hvussu rættur føroyskur bygdamóti kundi sæð út. Men tað er tað ikki. Myndin er tikin á eini mótasýning í Spania, og tað er ein maður, sum eitur Carlos Diez, sum hevur gjørt hesi klæðini - ella hvat tað nú kann kallast.